# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er álvarssamt at lata fangarnar halda, at teir verða druknaðir, men eg haldi ikki, at tað er píning*
*John Ashcroft*



*Imam Samuda, Ali Ghufron og Amrizi vilja heldur doyggja sum píslarváttar enn at biðja um grið*

*Mynd: Polfoto*

# Bumbumenninir á Bali sleppa ikki undan deyðadóminum

**Teir eru dømdir til deyða fyri at hava skipað fyri bumbuatsóknini á Bali í 2002, og teir sleppa ikki undan deyðadóminum**

Imam Samuda, Ali Ghufron og Amrizi vórðu í 2003 dømdir til deyða fyri at hava verið við til at skipa fyri og fullføra ta blóðu bumbuatsóknina á indonesisku frítíðaroynni Bali í 2002. Allir tríggir eru limir tí islamistiska uppreistrarfelagsskapinum Jemaaj Islamiah, og síðani dómin hava teir sitið í einum fongsli á suðurstrondini á indonesisku oynni Java.

Herfyri bóðu teir dómsvaldið broyta deyðadómarnar til fongsulsrevsing, men í gjár avgjørdi rætturin, at deyðadómarnir verða ikki broyttir, men standa við.

Teir tríggir hava ikki fleiri møguleikar at royna málið í rættarverkinum. Teirra einasti møguleiki at sleppas undan deyðarevsing er at biðja indonesiska forsetan um grið, men teir hava sagt, at tað fara teir ikki at gera. Teir vilja heldur doyggja sum píslarváttar, hava teir sagt.

Bumbuatsóknin á Bali er ein tann ringasta yvirgangsatsóknin. 202 fólk doyðu, teirra millum nógv útlendsk ferðafólk.

# Brúktu kavbát at smugla rúsevni við

**Tað er næstan ikki mark fyri, hvat rúsevnahandilsmenn kunnu finna uppá, tá tað ræður um at smugla rúsevni millum lond**



*Meksikanskir herflotamenn eru settir umborð á smuglarakavbátin*

*Mynd: AP*

Átøk hjá amerikonsku og meksikonsku myndugleikunum gera, at tað er vorðið trupult hjá rúsevnahandilsmonnunum at smugla rúsevni úr Meksiko til USA. Trýstið á hesa flutningsleiðina er eisini vaksið, tí alt meiri rúsevni úr Kolombia verður nú flutt til Meksiko, haðani tað so eftir ætlanini skal til USA.

Nú um dagarnar fekk eitt eftirlitsflogfar hjá meksikanska flogvápninum ein kavbát úti fyri meksikonsku kyrrahavsstrondini. Tað var týðiligt, at hetta var ikki ein vanligur kavbátur. Sjóverjan sendi skip á staðið, og tá kavbáturin kom upp í vatnsskorpuna, tóku herflotamenn seg umborð á hann og tóku teir fýra menninar, sum mannaðu hann.

Tað vísti seg, at kavbáturin bleiv brúktur til at smugla rúsevni við. Meksikonsku myndugleikarnir siga, at rúsevnahandilsmenninir leita støðugt eftir nýggjum flutningshættum fyri at sleppa undan um myndugleikarnar, men hetta er fyrsta dømið um, at eisini kavbátar verða brúktir sum smuglifør, skrivar AP.

## STUTT SAGT

### Flogfeløg hava tað trupult

Alt bendir á, at tey stóru amerikonsku flogfeløgini hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Í gjár kunngjørdi American Airlines, at tað hevði 1,4 milliard dollarar í halli í apríl ársfjórðingi. Sagt varð, at tað nógv dýrkaða brennievnið er høvuðsorsøkin til tað vánaliga úrslitið. Løtu seinni boðaði Delta Air frá, at tað hevði havt eina milliard dollarar í halli í øðrum ársfjórðingi.

Í juni kunngjørdi Delta Air, at tað hevði sagt 4.000 fólk úr starvi. Sagt varð, at uppsagnirnar vóru ein neyðugur liður í ætlanini at leggja Delta Air og Northwestern saman um ársskiftið.



*Delta Airlines hevur stórt hall*

*Mynd: Polfoto*

### Leysur ímóti trygd

Andstøðuleiðarin í Malaysia, Anwar Ibrahim, er sloppin úr varðhaldinum ímóti veðhaldi. Hasnn bleiv tikin fyrradagin og lagdur undir at hava havt kynsligt samband við ein annan mann. Sjálvur vísir hann skuldsetingini aftur. Hann vil vera við, at hansara politisku mótstøðumenn royna at spilla seg út fyri at forða fyri, at hann skal fáa politiska ávirkan aftur. Eygleiðarar í Malaysia siga, at avgerðin hjá myndugleikunum at handtaka Anwar Ibrahim fer uttan iva at elva til politiskan spenning í landinum.

Hetta er aðru ferð, at Anwar Ibrahim verður skuldsettur fyri at hava havt kynsligt samband við annan mann. Malaysisk lóg bannar tveimum av sama kyni av hava kynsligt samband.



*Anwar Ibrahim*

*Mynd: AP*